# Til læraran




Summardáar, Heine Hestoy

Bókadeild Føroya Lærarafelags 1995

Rannvá Hansen 2022

## Um bókina

Heine Hestoy hevur skrivað bókina *Summardáar*, og hon kom út í 1995. Bókin er um Jóannes, sum júst er liðugur við 9. flokk. Hann ætlar sær til skips, men beint áðrenn hann skal avstað, hittir hann Marjuna. Henni leingist hann illa eftir, meðan hann fiskar undir Grønlandi. Heimafturkomin er hann broyttur og má ásanna, at tíðin ikki hevur staðið í stað, meðan hann hevur verið burtur. Vit hoyra um lívið umboð á línubátinum, men vit hoyra eisini um, hvussu tað gongst Marjuni, sum er heima.

Í 2014 bleiv bókin *Summardáar* týdd til danskt, og fekk heitið *På krogen*.

## Um rithøvundin

Heine Hestoy er føddur á Tvøroyri í 1950 og vaks upp har. Heine var til sjós í nøkur ár, fór so á skúla í Marstal í Danmark og tók skipsførarapróg v. Síðan hevur hann búð í Danmark og siglt sum skipari.

Heine Hestoy hevur skrivað stuttsøgur, barna- og ungdómsbøkur og eitt hoyrispæl. Hann viðger ofta gerandisdagin og samspælið ímillum menniskju og arbeiðslívið.

Í 1991 fekk Heine Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs fyri barnabókina *Regin og Sára*.

Bókadeild Føroya Lærarafelags gav skaldsøguna *Summardáar* út í 1995.

## Uppgávur og arbeiðsgongd

Uppgávurnar til *Summardáar* eru ætlaðar næmingum í 8. – 9. flokki. Uppgávurnar eru ætlaðar sum einstaklingauppgávur og eru bygdar upp eftir leistinum áðrenn tú lesur, meðan tú lesur og tá ið tú hevur lisið.

Um skaldsøgan verður lisin upp í skúlanum og arbeitt verður við uppgávunum so hvørt, so tekur hetta arbeiðið umleið 18-20 tímar. Næmingarnir kunnu lata uppgávuna inn, og hetta kann telja við sum skrivligt avrik.

# Førleikamál

Uppgávurnar og arbeiðshátturin nema serliga við hesi førleikamál úr námsætlanini.

***Talaða málið***

- *at nýta talumálið skilliga og málsliga rætt í t.d. kjaki, samrøðu og framløgu*

***Skrivaða málið***

- *grundleggjandi greining og tulking av eini skaldsøgu, umframt at seta tekst í frásjón*
- *at skriva frásøgukent, gera viðmerkingar og grundgeva*
- *at orða seg málsliga rætt og greitt í ymiskum málsligum stíllegum við fjølbroyttum orðafeingi*
- *at nýta orðabøkur, rættstavara og leitiskipanir á teldu*

***Málkunnleiki***

- *at vísa á grundleggjandi innlit í føroysku málskipanina*

# Áðrenn tú lesur

Gott er at byrja við felags práti í flokkinum um, hvat sæst á permuni, áðrenn næmingarnir fara í holt við at svar spurningunum.

Næmingarnir svara síðan hvør í sínum lagi spurningunum og at enda leita teir á netinum eftir upplýsingum um ymiskt, sum Heine Hestoy hevur skrivað.

# Meðan tú lesur

Í hesi skaldsøguni eru helst nógv orð, sum næmingarnir ikki kenna frammanundan, serliga tá ið hugsað verður um lívið umborð á einum línubáti. Á s. 4 í uppgávuheftinum skulu næminganir skriva hesi orð niður, og hvørji síðu tey standa á. Næmingarnir skulu altíð hava hetta við hondina, tá ið teir lesa *Summardáar*, ella tá ið lisið verður fyri teimum. Eitt hugskot er at hava flokssprát um orðini, sum eru ókend fyri næmingunum, so hvørt sum ein kapittul er lisin. Tað ber eisini til at fara á sprotin.fo at kanna orðini, og hvat tey merkja.

Næminganir skulu royna at gera eina hóskandi yvirskrift til hvønn kapittul og annars svara spurningunum, sum hoyra til ymisku kapitlarnar.

## Tá ið tú hevur lisið

Tá ið øll skaldsøgan er lisin, fara næminganir at greina og tulka skaldsøguna gjøllari á ávísum økjum. Síðan greiða teir frá, hvat teir halda um bókina og skriva eitt bókaummæli.

Undirvísingargongdin endar við, at næmingarnir lesa hart upp tað brotið í bókini, sum teimum dámar best, og greiða frá, hví teimum dámdi júst hetta brotið best.